# Todi verður viðgjørdur við sjokk-bylgjum

**Føroyski álops-spælarin spældi ikki við í venjingar-dysti sunnudagin, tí dóttir hansara brendi hondina í síðstu viku, og har-við varð viðgerð við sokallaðum sjokkbylgjum útsett nakrar dagar**

**FÓTBÓLTUR**
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Todi Jónsson hevur ilt við at sleppa av við ein skaða, sum hann hevur í hælsinuni, og nú roynir Start nýggjar leiðir fyri at fáa sítt álopsess klárt til kappingina, sum byrjar 9. apríl.

Todi fær viðgerð við sokallaðum sjokkbylgjum, og hesar bylgir gera, at hann kann ikki venja ella spæla í tríggjar dagar aftan á hvørja viðgerð.

– Vit hava gjørt alt, vit kunnu gera fyri at fáa skaðan burtur, men tað hevur ikki eydnast. Tí mugu vit royna nakað nýtt, og ætlanin er, at Todi skal fáa viðgerð við sjokkbylgjum tríggjar ferðir. Skal hann av álvara kunna spæla í ár, mugu vit gera hetta, sigur fysioterapeuturin hjá Start við blaðið Fedrelandsvennen.

Roknað verður við, at um hendan viðgerðin verður løgd væl til rættis, fer hon ikki at ávirka dystir hjá Toda, men hann má halda frí frá venjing í tríggjar dagar eftir hvørja viðgerð.

**Dóttirin brendi sg**

Fríggjadagin fekk Todi fyrstu viðgerðina við hesum sjokkbylgjum, og hon varð gjørd í Oslo. Ætlanin var, at Todi skuldi fáa hesa viðgerð fyrr í síðstu viku, men Fedrelandsvennen skrivar, at alt varð órógvað av, at dóttir hansara brendi seg illa í hondina av eini steikiplátu.

Tí fór Todi ikki til Oslo fyrr enn fríggjadagin, og so kundi hann ikki spæla við í dystinum sunnudagin, tá ið Start vann venjingardyst ímóti Odd Grenland 1-0.

Hetta var seinasti venjingardysturin, áðrenn Tippuligan byrjar næsta vikuskiftið.

## Byrial og teir hildu tætt

AC Horsens spældi sunnudagin ímóti FC Midtjyllandi í donsku superliguni, og felagið hjá Johan Byrial Hansen fekk javnleik burtur úr dystinum. Einki mál kom í dystinum, og tað vóru teir í AC Horsens væl nøgdir við. AC Horsens er einasta felag í superliguni, sum ikki hevur tapt higartil í ár, og Johan og liðfelagarnir hava mest sum tryggjað sær plássið í bestu donsku deildini. Í donskum fjølmiðlum verður sagt, at AC Horsens hevur bestu verjuna í superliguni, og tað er tí, at liðið hevur fingið so nógv stig. Føroyski landsliðsspælarin Johan Byrial Hansen hevur verið ein av verjuspælarunum hjá liðnum í hesum kappingarárinum.



## KÍ fer eftir Sinisa

Serbiski verjuspælarin Sinisa Jovanivic hevur royndarvant í KÍ seinastu vikurnar, og felagið er væl nøgt við hansara avrik. Partarnir hava gjørt av, at teir skulu samstarva í hesum kappingarárinum, og nú verður arbeitt við at fáa loyvini upp á pláss, so at Sinisa kann spæla við KÍ innan stutta tíð. Sinisa Jovanivic hevur millum annað spælt fyri Haiduk í Beograd, og hann hevur eisini roynt seg í tveimum feløgum á Kypros.



# Mótbrekkan kann gerast brøtt beinanvegin

**Tveir av favorittunum kunnu skjótt koma undir trýst, meðan aðrir favorittar løgdu betri fyri, enn teir gjørdu tað í fjør**

**FORMULA DEILDIN 1.UMFAR**
*Jóannes Hansen*

So er brostið fyri nevi. Sjøtul er settur á landskappingina í fótbólti. Fyrsta fintan var, at fótbólturin krússaði kavan av. Tað var kritahvítt á vallunum sunnumorgunin, og tað var kritahvítt í morgun. Men seinnapartin sunnudagin vóru fín líkindi.

14 mál vórðu skorað í teimum fimm uppgerðunum. Í fjør komu 18 mál í fyrsta umfarinum. Tá var størsti sigurin tann hjá Skála, sum vann 5-1 á TB á heimavølli. TB flutti niður eftir 27 umfør, og Skála endaði á silvurplássi. Hesa ferð var største sigurin tann hjá HB, sum vann 5-1 á heimavølli móti ÍF.

Í fjør var tað merkisvert, at bæði havnarfeløgini taptu í fyrsta umfari. HB tapti 4-3 í Klaksvík, og B36 tapti 1-0 á heimavølli móti NSÍ. Júst hjá NSÍ kann hetta vera troystin eftir fyrsta umfarið hesa ferð. Ikki at teir stóðu fyri kanska mest óvæntaða úrslitinum hesa ferð, tá ið teir á heimavølli kiksaðu 1-0 móti KÍ. Men at tað ber til at vinna FM, hóast fyrsti dysturin á heimavølli verður taptur 1-0!

Burtursæð frá Bárði Johannesen í málinum og Jákupi á Borg, sum nú er vorðin ein av teimum meiri royndu í føroyskum fótbólti, so var HB í rættuliga nýggjari útgávu. Stórsigurin á ÍF ber sjálvsálit við sær. Fyrsta álvarsliga próvtøkan hjá nýggja liðnum verður, tá ið teir í 2. umfari fara at fáa vitjan av EB/Streymi, sum ongantíð hevur havt tað serliga stuttligt móti HB í Gundadali.

EB/Streymur fekk fulla úrtøku, men í 2. hálvleiki var tað ikki sannførandi móti uppflytarunum úr B68. At tapa 2-1 á Mølini er ikki nøkur skandala. GÍ vann sannførandi á heimavølli móti VB/Sumba. Oyggjauppgerðin á Svangaskarði í 2. umfari fer at geva betri peiling av, hvussu uppflytararnir í B68 og GÍ, sum í fjør bjargaði sær í yvirtíðini, eru fyri.

Meistararnir í B36 taptu í fjør í fyrsta umfari á heimavølli. Nú vunnu teir torføra uppgerð á útivølli í fyrsta umfari. Sunnudagin kunnu teir í Fuglafirði seta trumf á framúr byrjan, áðrenn teir í fyrsta heimadystinum skulu spæla móti KÍ. Klaksvíkingar vunnu í fjør í fyrsta umfarinum móti HB á heimavølli. Kappingarárið varð kortini kiksað. Hvussu tað fer at roynast í ár verður ikki minst grundað á, hvussu tað fer at hilnast á heimavølli móti Skála og í Gundadali móti B36.

Skála og NSÍ høvdu ikki marginalirnar við hesa ferð. Í 2. umfari skulu teir spæla á útivølli. Um tað ikki eydnast at fáa úrtøku og helst at vinna, so fer mótbrekkan at kennast brøtt og trýstið stórt heilt tíðliga í kappingini. VB/Sumba var undir stórum trýsti í Gøtu. Málverjin bjargaði teimum undan stórtapi. Hann fer ivaleyst at vera teimum hentur og at bjarga teimum stig. Ikki minst á heimavølli.

Í 2. umfari sunnudagin 9. apríl sær skráin soleiðis út: HB-EB/Streymur, ÍF-B36, KÍ-Skála, VB/Sumba-NSÍ og B68-GÍ.